

## Flutti til Kina undan milliardaskuld

Tá íslendsku bankarnir fóru á heysin á heysti í 2008, var føroyski vinnulívsmaðurin Jákup á Dul Jacobsen stórkundi í bankunum Glitni, Kaupting og Landsbankanum. Skuldin lá í níggju feløgum, sum tilsamans skyldaðu teimum trimum bankunum 470 milliónir evrur. Hetta kemur fram í frágreiðingini, sum tann serliga kanningarnevndin hjá Altinginum hevur skrivað. Har sæst, at lánini hjá feløgunum hjá Jákupi á Dul Jacobsen vuksu støðugt frá 2005 og úteftir, og at tey vóru upp á tað mesta síðst í september í 2008 ella beint undan bankaskrædlinum. Tey størstu lánini vóru frá Kaupting, og tey vóru oman fyri 300 milliónir evrur, tá skuldin var upp á tað mesta. Lánini frá Landsbankanum vóru upp á 250 milliónir evrur. Seinasta heyst kom fram, at Jákup á Dul Jacobsen var fluttur úr Íslandi við familjuni. Nú býr hann í Shanghai í Kina. - Eg keypi so miki nógv úr Kina, at eg verði helst noyddur at vera har og at taka mær av keypinum, segði Jákup á Dul Jacobsen tá.



*Finn Nielsen, sum er pápi Gunnar, er spentur upp á komandi systirnar hjá Machester City*

# Er errin av soninum

**FÓTBÓLTUR** Foreldrini hjá Gunnari Nielsen hava altíð stuðlað soninum. – Men vit settu sum treyt, at hann skuldi taka miðnámsútbúgving, sigur pápin Finn Nielsen

Randi Jacobsen

Tá ið dysturin millum Manchester City og Arsenal byrjaði leygardagin, setti Finn Nielsen í Havn seg at hyggja. Sonurin Gunnar sat á beinkinum sum málmaður, og pápin hevur tí alla tíðina fylgt væl við, hvussu gongst hjá liði hansara Manchester City.

Finn Nielsen sá teir fyrstu 60 minuttirnar av dystinum, men noyddist so at fara.

Ikki visti hann, at sonurin 10 minuttir seinni kom inn í málið og helt tað reint teir 22 minuttirnar, sum eftir vóru av dystinum.

– Eg havi verið úti og leitað á netinum, men havi bara funnið okkurt smávegis frá dystinum. Dysturin kemur ikki út á netið fyrr enn um einar tvær vikur, sigur Finn Nielsen.

### Hegni krevst

Fótbóltsspælarar, sum eru so hepnir og dugnaligir at koma í Premier League, vóna alla tíðina at sleppa á vøllin. Finn Nielsen fæst ikki at siga, um tey høvdu væntað, at Gunnar slapp í málið, men hann hevur frammanundan spælt bæði við Blackburn og við eykaliði hjá City.

– Tað ber ikki til at fáa sáttmála við slík lið, uttan so at spælarin hevur gávur, sigur Finn Nielsen.

Gunnar Nielsen var bara 15 ára gamal, tá ið hann fór til Danmarkar á fótbóltsskúla saman við trimum vinmonnum, sum allir fóru at spæla við Frem.

Sum smádrongur spældi hann við HB.

### Stuðlaður heimanifrá

– Vit hava altíð stuðlað honum í fótbóltinum, men vit settu sum treyt, tá ið hann var liðugur við fótbóltsskúlan, at hann skuldi fáa sær eina miðnámsútbúgving. Aftaná tað var hann nóg vaksin til, sjálvur at ráða, sigur Finn Nielsen.

Tá so Gunnar hevði tikið miðnámsskúlaprógv, fór hann á handilsskúla í Ishøj uttan fyri Keypmannahavn. Hetta er ein handilsskúli fyri elituítróttarfólk, og øðrvísi við hesum skúla er, at tað verður ikki kravt líka nógv uppmøting. Hugt verður bara eftir, hvussu næmingurin stendur seg.

Gunnar tók hægri handilsskúlaprógv og kundi so fara víðari.

Nú er Gunnar Nielsen 23 ára gamal. Hann hevur føroyska unnustu, og tí væntar Finn Nielsen næstan, at sonurin eina ferð kemur heim aftur til Føroya at búgva. Men hann kemur neyvan, so leingi hann roynir at gera professionella karrieru.

Nú bíðar familjan hjá Gunnari bara eftir at frætta, um Gunnar aftur sleppur at royna seg í málinum. Manchester City hevur tríggjar tydningarmiklar dystir eftir, og kanska skal Gunnar Nielsen spæla teir dystirnar.

randi@sosialurin.fo

# Hassjplantasja avdúkað í Havn

**RÚSEVNI** Kriminalpolitiið legði í seinast viku halda á 27 hassjplantur umframt hassj og útgerð í einum húsum í Havn

Randi Jacobsen

Kriminalpolitiið hevur fingið nakrar fráboðanir frá fólki, sum hava havt ilgruna um, at onnur dyrkað hassj heima.

Mánadagin eygleiddi politiið tí eini hús í eysturbýnum í Havn.

Um kvøldið kom ein maður á gátt í húsunum, og tá ið hann koyrdi avstað aftur, varð hann eltur av politinum, sum tók mannin. Maðurin hevði hassj hjá sær.

So fór politiið til húsini, har politiið í einum kamari fann 27 hassjplantur umframt roykiklárt hassj og útgerð.

Deymurin stóð frá øllum plantunum, og soppavøkstur var um alt kamarið.

Tann umleið 30 ára gamli maðurin, sum hevði plantasjuna, varð tikin, og mikudagin var hann í rættinum.

Hann kærdi, at politiið hevði rannsakað húsini, men rætturin segði tað vera í lagi.

Hald varð lagt á plantur, hassj og útgerð. Planturnar fyltu upp í ein stóran posa, og deymurnar var so nógvur, at av heilsuávum vórðu planturnar fyribeindar.

Maðurin við hassjplantasjuni búði í húsunum saman við konu og barni, og við tað at eitt barn var í húsunum, varð fráboðan send sosialu myndugleikunum.

randi@sosialurin.fo

**HASSJ**

*27 slíkar plantur fann politiið í húsunum*

